tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Útbjóðing nærkast

## *Oddagrein*

TÁ tingið kemur saman aftur um eina viku verður eitt stórt álvarsmál aftur til umrøðu. Tað er komandi útbjóðingin av føroyska landgrunninum til oljuleiting.

VINNUNEVNDIN viðger í hesum døgum uppskotið frá landsstýrinum og stendur tað til formannin í nevndini, so fer uppskotið óbroytt aftur í tingið. Hann vónar at fáa eina samda nevnd at taka undir við tí, men hetta er ivasamt, tí tingfólk úr báðum teimum stóru andstøðuflokkunum hava sett spurnartekin við okkurt í uppskotinum. Eitt nú vilja tinglimir úr bæði Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum hava við í 1. útbjóðing okkurt, sum líkist eini almennari luttøku í komandi leiting, tvs. antin eitt landsoljufelag ella eitt borið felag tvs. eina optión. Munurin á hesum báðum er tann, at við optión ger tú ongar íløgur nú, men tekur fyrst støðu til um tú skal fara inn við almennum oljufelag, tá olja er funnin. Ein annar spurningur, sum ósemja er um, er, hvar oljuútgerðarhavnin skal liggja. Her hevur Javnaðarflokkurin boðað frá, at hann fer møguliga at koma við einum uppskoti til 2. viðgerð.

OKKARA olju- og skattakønu bæði í Oljumálastýrinum og Fíggjarmálastýrinum hava gjørt politikararnar varugar við, at uppskotini, sum antin eru ella verða løgt fyri tingið um eitt nú skatting av oljufeløgum eru at meta sum ein pakki. Koma nú nýggj krøv um antin eitt landsoljufelag ella eina optión, so broytir tær henda pakka, soleiðis at oljufeløgini fara at meta hetta sum nýggjar treytir. Tá er spurningurin um tann javnvág, sum okkara oljumyndugleikar hava lagt seg eftir fyri at fáa oljufeløgini at gera íløgur her, er flutt.

FLESTU av lógaruppskotinum, sum eru grundarlagið undir 1. útbjóðing, eru løgd fram. Nú restar so bert serskatturin, sum helst verður lagdur fyri tingið mitt í næstu viku, eftir at landsstýrið hevur havt hann til endaliga umrøðu. Eins og hini uppskotini skal hann eisini í nevnd eftir 1. viðgerð. Tvs. at vit uttan iva fara inn í februar mánað, áðrenn allur lógarpakkin viðvíkjandi 1. útbjóðing er endaliga samtyktur. Tá skuldi so verið klárt hjá Oljumálastýrinum at latið upp fyri hesi útbjóðing, ið hevur verið bíðað eftir so leingi.

ENN hava vit einki frætt um komandi leiting í bretskum øki úti á Atlantsmótinum. Men hon man neyvan vera so langt burturi, nú myndugleikarnir har hava valt ikki at fara víðari við málinum, sum Greenpeace fekk viðhald fyri í rættinum. Tað ljóðar, at bretska stjórnin ætlar sær at halda reglurnar í tí sokallaða „Habitatdirektivinum“, sum snýr seg um umhvørviskrøv úti á opnum havi. Hetta fer at merkja, at umhvørviskrøvini til oljufeløgini, sum verða við í komandi útbjóðing, fara at vera tað harðari. Áhugavert verður eisini at síggja, hvørjar skattatreytir bretar annars fara at seta til komandi leiting.

*Sosialurin*

## Við merking:

# Ein atfinningarsom rødd vestan úr Vágum

Fyrrverandi floksskrivari okkara, Hans Jørgensen, hevði fríggjadagin eina grein í Sosialinum við heitinum: „Missir Javnaðarflokkurin mál síni á gólvið?“ Lat meg beinanvegin siga, at greinin er móttikin í tí rætta andanum. Hetta vóru nakrar vælmeintar atfinningar og ein ásannan av, at flokkurin hevur so nógv góð mál at stríðast fyri, at tað er spell, at tey fylla so lítið í tí dagliga kjakinum. Og ein áheitan um, at vit gera nakað við hetta.

Hans Jørgensen varð í sínari tíð saman við øðrum settur av flokkinum til at skipa fyri einum uppleggi um kommunapolitikk. Hetta førdi so seinni til, at vit fingu eitt liðugt uppskot um eina nýskipan á kommunalpolitiska økinum, sum síðan er viðgjørt av flokskleiðsluni og samtykt av landsfundi floksins.

Men síðan er sambært Hans ov lítið hent við at fáa henda boðskapin út millum manna, og tað tykist sum um, at bert tvey uppskot eru til á kommunuøkinum, nevniliga uppskotið hjá samgonguni og so uppskotið frá kommunubólkinum hjá Elifi Samuelsen.

Tað er einki at ivast í, at Hans í hvørfall partvís hevur rætt í hesum, og henda kritikkin mugu vit sum tingmanning og vit sum starvsnevnd taka til okkara.

Tá vit samanbera kommunumálið við eitt nú sjálvstýrismálið, so er einki at fara skeivur í, at tað hevur eydnast okkum munandi betur at hava verið við í kjakinum um sjálvstýri við okkara uppskoti um eina sjálvstýrislóg, enn vit hava verið frammi við okkara annars ótrúliga góða uppskoti til eina kommunuskipan. Men tá tað er sagt, so skal eisini sigast, at sjálvstýrismálið hevur fingið munandi meira rúmd í kjakinum enn kommunumálið. Í grundini hevur sjálvstýrismálið ella rættari fullveldismálið staðið einsamalt á dagsskrá, bæði tí politisku og teirri hjá fjølmiðlunum.

19. apríl í fjør var aðalorðaskifti um eina frágreiðing, sum løgmaður sum landsstýrismaður í kommunumálum hevði lagt fram. Frágreiðingin var hansara, men grundarlagið undir frágreiðingini var eisini álitið frá kommunubólkinum. Vilhelm Johannesen, sum var okkara framsøgumaður, hevði eina góða framsøgurøðu, har hann fyrst og fremst lýsti okkara uppskot til eina kommunuskipan við m. a. bygdaráðum og økisráðum.

Men eg má geva tær rætt í, at síðan er lítið hent á hesum øki. Við hvørt hoyra vit í fjølmiðlunum serliga Helenu Dam á Neystabø tosa um at leggja barnaansingina út til kommunurnar, og onkuntíð Tórshavnar býráð við ynskinum um, at eldraøkið eisini verður lagt út til kommunurnar.

Vit áttu kanska, sum vit gjørdu við sjálvstýrisógini, at fingið kommunuuppskotið prentað og útgivið í einum faldara, men tað kunnu vit náa enn. Hin vegin so liggur uppskotið á heimasíðu floksins, so almenningurin, men eisini fjølmiðlarnar kunnu fara inn og lesa uppskotið.

Løgmaður hevur nú sent uppskot um nýggja kommunulóg út til viðmerkingar, og vit skulu í ár hava kommunuval, so tað er einki at ivast í, at kommunumálið verður flutt fram á dagsskránni.

Ikki fyri at koma við umberingum, so er tað hin vegin rættiliga tungt at arbeiða sum andstøða í føroyskum politikki. Umsitingarliga hevur tingmanningin onga hjálp, men nú hoyrist, at skrivarar skulu setast til tingmanningarnar, so tað verður avgjørt ein stór hjálp.

Politikkur er sum einhvør søluvøra. Tú verður noyddur at marknaðarføra politikkin, soleiðis at boðskapurin kemur út til teirra, sum skulu taka støðu til hansara. Annars er „politisk upplýsing“ eitt nógv niðurprioriterað øki. Játtanin til allar flokkar er í dag 2,7 mió. kr., og til samanberingar kann eg nevna, at DSU í Danmark hevur ein rakstur uppá eitt stað millum 8 og 9 mió. kr. Eitt uppskot um at hækka játtanina til „politiska upplýsing“ fall við eitt brak, tað fekk bert 7 atkvøður.

Haraftrat kemur, at fjølmiðlarnir vanliga halda, at landsstýrið og samgongan eru munandi meira áhugaverd enn ein andstøða, sum kanska í nógvum førum er ov atfinningarsom mótvegis samgonguni. Eg komi at hugsa um seinasta Fimmara um pensjónirnar, har útvarpið breyt allar journalistiskar grundreglur, tí eingin úr andstøðuni var við. Luttakararnir sungu allir í sama kóri. So tað er heldur ikki altíð so lætt at fáa boðskapin út í andstøðu, tí júst fjølmiðlarnir eru her ein sera týðandi táttur.



Eisini í tí dagliga sakna vit tíverri í stóran mun ta breiðu journalistisku linjuna hjá serliga SVF, men eisini hjá ÚF, har mál verða lýst frá báðum síðum, so sum vit síggja í øðrum londum. Tað ger støðuna hjá andstøðuna uppaftur torførari.

Men vit koma ikki uttanum, at fullveldismálið hevur ruddað dagsskránna fyri øll onnur mál, og tað skal leika hart á, áðrenn onnur mál vinna fram. Tað hevur kanska gjørt gerandisdagin hjá nógvum léttari, kanska serliga hjá fjølmiðlunum.

Annars var tað hugaligt at lesa grein tína. Aftur kundi man síggja eldhugan og títt hugsjónarliga kjølfesti, sum vónandi smittar onnur. Tú hevur rætt í tí, at tað forpliktar okkum javnaðarfólk meir enn onnur at fáa boðskapin út, tí vit kunnu ikki leggjast á boðini. Tað eru tey alt ov góð til..

Hans, vit royna at gera nakað við hatta. Takk fyri atfinningar og ráð.

**Jóannes Eidesgaard**
**floksformaður**

# Eru telefontakstirnir veruliga lækkaðir?

Fríggjadagin í síðstu viku komu fjølmiðlarnir við stórtíðindum um, at tað fer at blíva bíligari at tosa í telefon.

Føroya Tele boðaði til tíðindafund, har stjórin Andras Róin greiddi tíðindafólki og øðrum áhugaðum frá, at nú fór at verða bíligari at tosa í telefon.

Tað tykist at verða løgi, at monopolfyritøkur skulu síggja kappingarneytar fyri framman fyri at vakna úr sínum tornurósusvøvni, áðrenn teir kunnu veita eina betri og bíligari tænastu. Hetta eru Tryggingarfelagið Føroyar, Útvarp Føroya og onnur gott dømi um.

Tá vit tosa um teleøkið, so er tað ein ógvuliga stórur spurningur, um tað nú veruliga verður bíligari at tosa í telefon. Hettar minnur mest um BUGLI BUGLI-kampagnuna hjá SEV á sinni. Meir tú tosar í telefon, meir sparir tú. Um tú tosar nóg leingi, verður hettar helst uttan kostnað, ella tosar tú teg ríkan.

Í samrøðu við fjølmiðlarnir upplýsur stjórin á Føroya Tele, at nú hevur stovnurin fingið fleiri bein at standa á, enn áður, sostatt kunnu teir nú lækka prísin á telefonsamrøðum.

Hvørji eru so hesi beinini, sum Føroya Tele hevur fingið at standa á?

Eitt av beinunum tykist at verða uppringingargjaldið. Áðrenn 1. juni 1999 var hettar gjaldið 0, og eftir 1 juni bleiv hetta so 30 oyru og verður nú hækkað til 40 oyru.

Tað fasta gjaldið verður hækkað frá 89 krónum til



115 krónur, t.v.s. at fasta gjaldið hækkar við 26 krónum.

Hesi sokallaðu beinini, sum Føroya Tele sigur seg at hava fingið at standa á, eru rein kamuflaga. Tað, sum Føroya Tele ger, er nevniliga at geva við høgru hond, fyri síðani at taka aftur við vinstru hond, sera smart.

Omanfyri er nevnt, at Føroya Tele ásetti eitt nýtt uppringingargjald uppá 30 oyru í juni 1999. Tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvat hetta gjald hevur givið í krónum?

Tá ið tosað verður um lækkingar, mugu hesar síggjast aftur á sjálvari rokningini og ikki í øking av telefonsamrøðum. Einasti møguleiki fyri veruligari lækking er frí kapping.

Um vit skulu hava fría kapping í Føroyum, má telemarknaðurin latast upp fyri øllum, sum ynskja at veita føroyingum hesa tænastuna.

Frí kapping er bert, um øll kunnu koma inn á hetta økið, tað verið seg onnur føroysk feløg og útlensk. Tá fáa vit eina tænastu og ein prís, sum verður lagaður eftir marknaðinum.

**Schumann Hjaltalin**



# Løgtingið misskilt stýrisskipanina

*Anfinn V. Hansen, advokatur, ið hevur verið við til at gjørt stýrisskipanina, er ikki samdur við tosinum um, at stýriskipanin ikki virkar. Trupulleikin er, at løgtingið nýtir hana skeivt*

John Johannessen

– Løgtingið skal ikki ikki standa til svars fyri landsstýrinum. Tað skal ikki skrumbla lógaruppskot ígjøgnum, bert tí, at landsstýrið ynskir tað.

Anfinn V. Hansen, advokatur, var við til at gera nýggju føroysku stýrisskipanina. Hann hevur fylgt við í kjakinum í seinastuni um leiklutin hjá ávíkavist landsstýrinum og løgtinginum.

Niðurstøðan hjá Anfinni V. Hansen er, at løgtingið ikki hevur rygg til at standa saman um at fáa lógaruppskot viðgjørd á rættan hátt.

### Nýtir ikki sítt vald

– Veruleikin er, at eingin annar enn løgtingið avger, hvussu drúgva viðgerð ymisku málini fáa. At mál verða skrumblað ígjøgnum er tað bert løgtingið, ið hevur ábyrgdina av. Sleppa landsstýrisfólk at avgera, hvussu drúgva viðgerð mál fáa, nýtir løgtingið ikki sítt vald rætt.

Anfinn V. Hansen vísir á, at løgtingslimir ongan rætt hava at koma við ákoyringum móti Helenu Dam á Neystabø í sambandi við, at nýggja pensjónslógin ikki er nóg góð. Ábyrgdina fyri hesum hevur løgtingið og trivnaðarnevnd løgtingsins.

– Einstaku nevndarformenninir og tingformaðurin hava ábyrgd fyri, at mál fáa ta viðgerð, teimum tørvar. Tað ber ikki til at tveita ábyrgdina fyri ,at vánalig lógaruppskot verða samtykt á landsstýrið.

### Nevndirnar eiga at lúka

Anfinn V. Hansen sigur, at tá Helena Dam á Neystabø leggur eitt vánaligt lógaruppskot fyri tingið, hevur trivnaðarnevndin skyldu at finna út av, at uppskotið ikki er nøktandi.

– Trivnaðarnevndin átti at havt viðgjørt uppskotið um nýggju pensjónskipanina so mikið væl, at hon legði til merkis, at uppskotið ikki var nóg gott. Síðani átti trivnaðarnevndin í áliti sínum at víst á skeivleikarnar og komið við uppskotum um neyðugar broytingar í uppskotinum frá almanna- og heilsumálaráðharranum.

Advokaturin vísir á, at tað eru løgtingið og nevndir løgtingsins, ið skulu syrgja fyri, at mál fáa ta neyðugu viðgerðina. Annars fær løgtingið bert leiklut sum avgreiðsluskrivstova hjá landsstýrinum.

### Løgmaður ber seg rætt at

Formaður Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinesen, vísti í farnu viku á, at løgmaður leggur upp til einaræði, tá hann sendir lógaruppskot frá landsstýrinum út til samgongutinglimir til ummælis, áðrenn tey koma fyri tingið.

Heini O. Heinesen vísti á, at hetta hevur við sær, at flestu uppskot landsstýrissins hálvavegna eru samtykt millum samgongutingfólk, áðrenn tey verða viðgjørd í tinginum. Sostætt fær andstøðan als ikki høvi at hava nakra ávirkan á uppskotini.

Anfinn V. Hansen er ikki samdur við formanni Tjóðveldisfloksins. Hann vísir á, at tað er heilt í lagi, at løgmaður sendir uppskot út til kunningar. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at samgongan stendur aftanfyri tey lógaruppskot, samgongan leggur fyri tingið, og tað heldur advokaturin vera heilt náttúrligt.

– Tað er eisini heilt vanligt í øðrum londum, at mál verða send út til kunningar áðrenn tey koma fyri parlamentið. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan samgongukríggi fyri opnum skermi.



*Anfinn V. Hansen heldur, at løgtingið má vísa sítt vald mótvegis landsstýrinum fyri at tryggja fólkaræði*

Anfinn V. Hansen vísir á, at í øðrum londum hava ymisku flokkarnir ávísar persónar, ið hava skyldu til at seta seg væl inn í ávísu málini. Hesir persónar kunna síðani hinar limirnar í flokkinum um málið og koma við tilmælum um møguligar broytingar og annað. Virkar hetta ikki í Føroyum, er tað ikki tí, at nakað er galið við stýrisskipanini, men heldur tí, at floksapparatini ikki virka, heldur Anfinn V. Hansen.

Ráðini frá advokatinum, ið sum sagt hevur verið við til at gjørt stýrisskipanarlógina, eru, at løgtingið má standa saman um at vísa sítt vald mótvegis landsstýrinum, soleiðis, at løgtingið ikki bert virkar sum avgreiðslustova fyri landsstýrið.

# Lindin byrjar at senda 21. januar

*Ætlanin var, at kristiliga útvarpsstøðin, Lindin, skuldi senda fyri jól. Men so varð ikki. Støðin leggur í staðin til brots 21. januar við fjølbroyttum tilfari*

John Johannessen

Fleiri sendingar liggja klárar at senda, men enn vantar ávís studioútgerð. Tí fer kristiliga útvarpsstøðin, Lindin, ikki alment at senda fyrr enn 21. januar.

Preben Hansen, ið er ein av stigtakarunum til útvarpsstøðina, sigur, at seinasta úrgerðin júst er komin til landið, og verður hon ikki á støðini fyrr enn einaferð í dag. Hendan útgerð skal síðani setast upp og royndarkoyrast, áðrenn støðin fer at senda.

### Skuldu byrja áðrenn jól

Upprunaliga var ætlanin, at Lindin skuldi senda fyrstu ferð 17. desember í fjør. Men hetta bar ikki til, tí sjálvur sendarin var tá enn ikki komin til landið. Meiningin var, at hann skuldi koma við flogfari úr Íslandi 15. desember, men nógvi jólaposturin gjørdi, at pláss ikki var fyri sendarарnum í flogafarinum hendan dagin.

Sendarin kom tó seinni í desember, og tí høvdu fyrireikararnir tó vónir um at senda fyri jól. Men so varð ikki, tí tá av tornaði, vantaði ávís studioútgerð.

### Kjøt á sendingunum

Tá Lindin fer at senda fríggjadagin 21. desember, verður tað ikki bert tónleikur, ið verður á skránni, eins og tað hevur verið fyrstu tíðina hjá hinum lokalútvørpunum í landinum. Lindin leggur út við sendingum beinan vegin.

Preben Hansen sigur, at fólk seinastu tíðina hava tikist við at gera sendingar, hóast øll studioútgerðin ikki hevur verið til taks, og tí ber til at leggja út við sendigum beinan vegin.

Fyrstu tíðina verður talið av sendingum ikki so stórt, men ælanin er at fáa meira kjøt uppá skránna hjá Lindini so við og við. Til dømis verða fyrstu barnasendingarnar ikki at hoyra fyrr enn um ein mánað.



*Preben Hansen, stigtakari til nýggju útvarpsrásina, Lindina*

# Fullveldismálið á veg í uttanlandsnevndina

*Formaðurin í uttanlandsnevndini væntar at fáa samráðingaruppleggið um ríkisrættarligu støðu Føroya til viðgerðar innan tvær vikur*

John Johannessen

Gongst sum ætlað, verður samráðingaruppleggið til donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya beint í uttanlandsnevnd løgtingsins einaferð í hesum mánaðinum.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, sigur, at sokallaða politiska prosessin hevur gingist væl, og heldur hann, at neyðugt er bert við fáum fundum afturat, áðrenn samráðingaruppleggið kann beinast í uttanlandsnevndina.

Nær samráðingarnar við donsku stjórnina byrja, ber ikki til at siga nágreiniliga, tí málið skal viðgerast gjølla í uttanlandsnevndini fyrst, og síðani skal danska stjórnin hava fýra vikur til at fyrireika seg í, áðrenn samráðingarnar kunnu byrja. Men fær uttanlandsnevndin málið innan tvær vikur, og varir viðgerðin í uttanlandsnevndini ein mánað, kann væntast, at samráðingarnar byrja einaferð um miðjan mars.

Hergeir Nielsen, formaður í uttanlandsnevndini, sigur seg vænta at fáa samráðingaruppleggið til viðgerar innan eina ella tvær vikur. Uttanlandsnevndin hevur ikki fund aftur fyrr enn hon hevur fingið samráðingaruppleggið til viðgerar, men tá verður fundur hildin beinan vegin, leggur Hergeir Nielsen dent á.

– Tað ber ikki til hjá mær at siga, hvussu drúgv viðgerðin av samráðingarupplegginum fer at verða í uttanlandsnevndini, men málið skal viðgerast gjølla samstundis, sum vit skulu leggja okkum eftir at finna eina so breiða politiska semju um málið, sum gjørligt, sigur Hergeir Nielsen.

Formaður uttanlandsnevndarinnar sigur seg ikki fáa sagt, um sokallaðu kaffifundirnir, løgmaður hevur havt við andstøðuflokkarnar um málið, fara at gera viðgerðina í uttanlandsnevndini léttari. Hann veit nevniliga ikki, hvussu nógv er komið burturúr kaffifundunum.

Leikluturin hjá uttanlandsnevndini í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya er at vera ráðgevandi hjá landsstýrinum.